

# Lýsing av Stanislavskij-skeiðnum

***Undirvísarin*** **Hanne Jørna** er útbúgvin sjónleikari frá Statens Teaterskole / Den Danske Scenekunstskole og hevur í fleiri ári verið knýtt at Statens Teaterskole og arbeiðir sum dramalærari á Opera-Akademiet í Keypmannahavn. Eitt tíðarskeið var hon fyribils leiðari av *Skuespillerlinien* á Statens Teaterskole og hevur eisini arbeitt á sjónleikaraskúlanum í Århus Teater.



Hanne hevur meir enn 20 ára royndir sum undirvísari, coach og framleiðari í improvisatións-skeiðum fyri bæði áhuga- og yrkisleikarum og sangarum. Eisini hevur hon hildið skeið fyri vinnurekandi, undirvísarum/lærarum. Harumframt hevur hon fleiri ferðir arbeitt saman við Keith Johnson og verið á lestrarvisti hjá Dario Fo og Franca Rame í Ítalien.

***Málbólkurin*** eru **áhugaleikarar, sangarar, fyrilestrarhaldarar, undirvísarar** og annars **einhvør**, ið hevur hug at menna sín kreativitet og førleika at bera naka fram.

***Arbeiðshátturin*** er grundaður á Stanislavskij. Hesin arbeiðsháttur tekur støði í m.a. improvisationsvenjingum, har luttakarnir arbeiða bæði sum einstkalingar og í bólkum. Eisini verður tikið støði í tí einstaka, har hann er beint nú.

***Venjingarnar*** fevna m.a. um:

- Improvisationsvenjingar
- Uppgávur, ið taka støði í ymiskum hættum í improteknikki
- "*De fysiske handlingers metode*" við støði í hv-orðini: *hvorfra, hvor, hvad, hvorfor, hvornår, hvorhen?*
- Kropsmálsvenjingar

***Endamálið*** er við venjingum at fáa nøkur amboð, so tú

- gert meira tilvitað/ur um, hvussu tú brúkar kroppin
- víðkar hugflogið og eygleiðingarevnini
- fært størri nærveru á pallinum
- fært innlit í egna styrki
- fært tamarhald á at standa / røra teg á palli
- lærir samspælið og sín ámillum ávirkan við onnur fólk
- lærir at samskifta við lurtaran / áskoðaran
- lærir sambandið millum kroppin og rúmið
- lærir at svara natúrliga til innvortis ella ytri innskot